# Lag hjá Teiti á hittfløgu

Teitur eigur eitt lag á sjálvnevndu debutfløguni hjá songkvinnuni Corinne Bailey Rae, ið hesa vikuna er best selda fløgan í Onglandi, við sambært heimasíðuni hjá Corinne Bailey Rae ikki færri enn 100 túsund seldum eintøkum.

Tað er serliga lagið Put Your Records On, ið liggur nummar trý á bretska stakfløgulistanum, ið hevur tryggja sølutølini.

Teitur sigur í tíðindaskrivi á myspace.com, at hann er sera errin av, at hava samstarvað við Corinne. Lagið hjá Teiti eitur „Choux Pastry Heart“ og er eitt av fleiri løgum, ið tey skrivaðu saman í íbúðini hjá Teiti í London fyri nøkrum árum síðan.Tað er serliga lagið Put Your Records On, ið liggur nummar trý á bretska stakfløgulistanum, ið hevur tryggja sølutølini.

Teitur sigur í tíðindaskrivi á myspace.com, at hann er sera errin av, at hava samstarvað við Corinne. Lagið hjá Teiti eitur „Choux Pastry Heart“ og er eitt av fleiri løgum, ið tey skrivaðu saman í íbúðini hjá Teiti í London fyri nøkrum árum síðan.

Á heimasíðuni hjá Corine Bailey Rae www.corinnebaileyrae.net ber til at hoyra brot úr lagnum.

**nud**

# Rok aftur í Kagganum

Rok spælir í Kagganum hetta vikuskiftið. Rok hevur verið rættiliga trúgvur gestur í Kagganum síðan umvælingina, og tað er kanska ikki uttan orsøk, her er talan um framúr góðan dansibólk.

Rok er bólkurin hjá Signar í Homrum úr Kjølum og Jóhan Ziskason úr Mark no limits. Hetta er ein av allar bestu og virknastu dansibólkum í landinum. Teir spæla leygarkvøldið aftan á miðnátt.

**nud**

# Roskilde Festivalurin váttar Bob Dylan

Fyri nøkrum vikum síðan kunngjørdi Morrissey at Bob Dylan fór at vera millum nøvnini á Roskilde Festivalinum í ár. Nú er hetta vátta á heimasíðuni hjá Festivalinum.

Bob Dylan hevur spælt á festivalinum fleiri ferðir áður. Hann er ein av heimsins bestu tónasmiðjum. Hann gevur í ár eina nýggja fløgu út, so eisini nýtt tilfar verður á skránni, ið er partur av konsertferðini The Never Ending Tour.

# Karaoke í Mentanarhúsinum í Fuglafirði

Leygarkvøldið verður karaoke í Mentanarhúsinum í Fuglafirði. Karaoke er vorðið alsamt betur umtókt í Føroyum og í Havn er karaoke næstan hvørt vikuskiftið. Men nú sleppa eisini eysturoyingar at royna seg við mikrofon í hond.

Umframt Karaoke verður eisini discotek har DJ-Markyman, hann lovar superfeitan og spildurnýggjan tónleik. Bussar koyra sum vant úr Havn, úr Vágum/Vestmanna og úr Eysturoynni.

**nud**

# Konsert við Skunk

Hóskvøldið 9. mars kl. 20 verður konsert við Skunk í Margarinfabrikkini. Skunk var við í GBOB og fekk sera jalig viðmæli har.

Skunk hevur eisini spælt til onnur tiltøk. Bólkurin er kendir fyri sín lívliga tónleik og tulking av lániløgum.

Manningin í Skunk er:

Tróndur Dalsgarð - sang og gittar, Hans Kristian Markman - gittar, Jan Myrá - bass og kór, Magnus Mortensen - trummir.

Tað er ókeypis atgongd til konsertina.

**nud**

# HEILSANIR



**Góðu Ægir, Sittihisak og Tyrnir**
Hjartaliga tillukku við føðingardøgunum tann 7., 10. og 27. mars.
**Bestu heilsir omma og abbi**



**Góða Durita**
Tillukku við 22 ára degnum kvinnudagin.
**Heilsan mamma og babba, Eyðun og John**



**Jenny**
Stóra takk fyri tíðina tú hevur lært hjá okkum. Gleði meg til líka gott samstarv í framtíðini. Eitt stórt tillukku.
**The Big Boss**




Tillukku við lærubrævinum.
**Bestu heilsur Ko-Dak**



**Góði pabba**
Hjartaliga tillukku við 30 ára degnum 7. mars. Vit elska teg.
**Heilsan diddurnar**



**Yo Girl**
Takk fyri eitt mega kvøld.
**Heilsan síðudaman**



**Góði Jónsvein abbi**
Hjartaliga tillukku á føðingardegnum. Ynskja vit øll
**Jónsvein, Brestir og Andrias**



**Góða elskaða Beinta**
vit ynskja tær hjartalia tillukku á tínum 18 ára føðingardegi. Vit elska teg og ynskja tær alt tað allarbesta í framtíðini og Guds ríku signing. Tey allarbestu ynskir frá
**Mammu, Boga og Skenkur**

Sosialurin
www.sosialurin.fo